## Stóra stjørnan úti

Marius Stankevicius er stóra stjørnan í litaviskum fótbólti. 26 ára gamli miðvallarin spælir í Brescia í Italia, men hann verður ikki við í dystinum móti Føroyum. Móti Skotlandi var hann óheppin í einum falli, og seinni er staðfest, at talan er um beinbrot. Hartil noyðist liðið at vera verjuspælaran Tomas Žvirgždauskas fyriuttan í kvøld. Hann er leikbannaður.



## Heitari hesaferð

Talan var um eina heldur kaldliga uppliving, sum tíðindafólkini høvdu í Kaunas fyri fimm árum síðani. Talan var um dyst í oktober mánaði, og tað var ikki frítt, at Jógvan Arge og Súni Merkistein, sum søgdu frá dystinum, bóru ótta fyri røddini, sum eisini skuldi halda til stórdystin í Hannover bara fýra dagar seinni. Væl ballaðir eydnaðist teimum tó at koma ígjøgnum samfullar 90 minuttir, men klæðini nýtast neyvan at vera heilt so heit hesaferð. Hóast tað er kølið um kvøldið, hevur veðrið í Kaunas verið so heilt hampuligt á ferðini. Og so er bara at vóna, at útvarpsmanningin fær orsøk at skrúva upp fyri volumuni.

## Skulu ansa eftir álopinum

**Litaviska liðið hevur eitt javnt sterkt lið, har ikki minst framrættaðu spælararnir tykjast sterkir, sigur Jógvan Martin Olsen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru fyrst og fremst sjónbandaupptøkur, sum eru grundarlagið undir kunnleikanum hjá Jógvani Martin Olsentil mótstøðuna í kvøld. Leygardagin spældi Litava móti Skotlandi, og tann dystin hevur føroyski venjarin hugt eftir.

- Har tykist ikki verið nakar einstakur spælari, sum er snúningspunktið fyri øllum spælinum, men talan er tó um eitt sterkt lið. Ikki minst tóktust teir trígir áleypararnir hjá liðnum at hava góðan bóltførleika, so teimum skulu vit heilt víst ansa okkum fyri, sigur hann.

- Í aðrar mátar, so verður talan um vanligu uppskriftina hjá okkara liði. Vit skulu standa væl á vøllinum, og so skulu vit tora at spæla, tá møguleiki býðst. Megna vit tað, so sleppa vit eisini undan ringasta litaviska trýstinum, og tað gevur so aftur betri møguleikar hjá okkum at spæla.

# Neyðugt at vit tora

**Jákup Mikkelsen ivast ikki í, at talan verður um trupla uppgávu í kvøld. Men heilt vónleysa heldur hann hana ikki vera**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*At føroyska liðið torir at spæla er fortreytin fyri, at litaviska trýstið ikki verður ov stórt, sigur Jákup Mikkelsen*

Tvær ferðir áður hevur Jákup, sum í kvøld spælir sín landsdyst nummar 52, vart føroyska málið í Litava. Báðu ferðirnar hevur hann verið so langt ífrá arbeiðsleysur. Men við framúr spæli í báðum dystunum gjørdi málverjin sítt til, at talan gjørdist um málleysan javnleiki í Vilnius í 1998 og avmarkað 2-0 tap í Kaunas í 2002.

Trýstið á føroyska málið var stórt fyrstu løturnar í báðum dystunum. Men Jákup Mikkelsen vónar ikki í, at trýstið verður heilt so stórt hesaferð.

- Tað vænti eg sum so heldur ikki. Tað kann gott vera, at teir vilja koma út við fullari ferð. Men hava verið væl skipaðir í seinastuni, og vit hava megnað at hildið bóltinum longri í egnari røð. Og gera vit tað, so verður trýstið á okkara mál av sær sjálvum væl minni.

- Og tí er tað eisini uppskriftin upp á eitt gott avrik, at vit skulu tora at spæla fótbólt.

Litaviska liðið, sum vit sóu á Tórsvølli í fjør, tóktist ikki megna at leggja eins stórt trýst á, sum teir áður hava gjørt. Er talan kanska ikki um eitt lið, sum er somikið nógv sterkari enn eitt nú føroyska landsliðið?

- Tað veit eg ikki. Men aftur í dystinum á Tórsvølli duga vit eisini væl at koma undan trýstinum. Og móti liðunum her á leið haldi eg, at vit altíð standa eftir við kensluni av, at teir vóru nú ikki so nógv betri. Eisini hóast vit aloftast ikki hava fingið nakað stig burturúr.

Tá tosað verður um stig, so er enn einki komið á føroysku kontina í hesari undankappingini. Umframt Litava, so eru dystirnir í heyst móti nummar eitt og tvey í heiminum og so einum liði, sum í fjør var millum átta tey bestu í heiminum. Tað er kanska fyrst og fremst í dag, at vit skulu droyma um nakað stig?

- Tað er helst einki at ivast í. Skulu vit hava eitt ella nøkur stig, so má tað vera nú. Og eg havi eisini góðar vónir um, at vit kunnu stjala okkum okkurt við av vøllinum, sigur Jákup Mikkelsen.

# Bogi basti Hafsteinni

**Um vikuskiftið vóru níggju føroyskir súkklarar í Íslandi og kappaðust. Her mátti Haffsetin Ægir Geirsson lúta fyri einum vælkoyrandi Boga Kristiansen**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Talan var um árligu afturvendandi súkklukappingina Tour de Iceland, og er kappingin vanliga í september mánaði.

Tríggjar kappingar vóru á skránni, og føroyskir súkklarar sluppu uppá sigurspallin í øllum kappingumum. Eisini ovast á sigurspallin.

Illa viðraði leygardagin, og tað merkti, at landavegskoyring og einkultstartur bæði máttu avgreiðast sunnudagin. Umframt hesar báðar kappingarnar var talan eisini um býarkoyring, og varð hendan kappingin avgreidd fríggjdagin.

### Bogi gav Haffstein harða kapping

Fríggjakvøldið bleiv kappast í býarkoyring, sunnumorgun í landavegkoyring og sunnudag seinnapart í einkultstarti.

Fríggjakvøldið var tað Bogi, ið gav Haffstein harða kapping. Hesir báðir kappaðust um gullið og bleiv tað til ein sigur til Haffstein Ægir Geirsson.

Sunnumorgunin løgdu súkklararnir til brots aftur. Koyrt bleiv í Hvalfirði og bleiv hetta ein drúgv og spennandi kapping.

Tíðliga slapp Kjartan Egholm og íslendingurin Kári Brynjólfsson avstað. Hesa føring hildu teir leingi. Men tá kappingin var á leið hálvrunnin, vórðu teir kortini heintaðir av Boga Kristiansen, Haffstein, Eli Christiansen, Árni M. Jónsson og Gunnar Dahl-Olsen.

Gunnar hevði ikki sín besta dag, og megnaði tí ikki at halda tørn, men tað gjørdu Bogi og Eli hinvegin, og teir hildu tørn móti einum væl koyrandi Haffstein. Tá seinasta brekkan skuldi koyrast bleiv hetta eisini ov mikið fyri Eli, og eisini hann misti takið.

Bogi kempaði og kempaði, og tá bert 200 metur vóru eftir á mál opnaði hann spurtin. Endaspurturin er ein av styrkjunum hjá Boga, og endin varð, at Bogi vann við einari sponn á Haffstein. Eitt úrslit sum ikki bara Bogi og hinir føroyingarnir vóru glaðir um. Eisini nakrir íslendingar fegnaðust um, at ikki ein og sami vinnari varð í øllum kappingunum.

### Eli í essinum

Er Haffstein sterkur til býarkoyring og landavegkoyring, so er hann enn sterkari í einkultstarti. Hann vann eisini tann 20 km langa einkultstartin so ruddiliga og umleið tveir minuttir var hann framman fyri nummar tvey, sum hesa ferð var ein sera væl upplagdur Eli Christiansen. Vinnara tíðin var 28 minuttir og 22 sekund. Tíðin hjá Eli var 30,19 minuttir, og við at halda eina meðalferð oman fyri 40 km/t hóast keðilig veðurlíkindini er talan kanska um flottasta einkultstartin, sum hann koyrt.

### Súsanna vann eisini

Kappast varð eisini millum kvinnur, og á føroyska liðnum súkklaði triathleturin og rógvarin Súsanna Skylv Sørensen.

Vegna vánalig floglíkindi luttóku Súsanna, Eli, Torkil Veyhe, Sverri og Gunnar ikki fríggjakvøldið, og Súsanna luttók tí í tveimum av teimum trimum kappingunum. Landavegkoyringina vann hon sunnumorgunin og seinnapartin vann hon eisini 20 km einkultstartin. Hon koyrdi teinin uppá 36 minuttir og vann hon við umleið einum hálvum minutti á nummar tvey, ið gjørdist Lára Bryndís Eggertsdóttir.